# Einsporaðu tunlarnir í á Borðoynni og í Suðuroy eru lívshættisligir

SJÓNARMIÐ
*Bergur Jacobsen*



*"De gamle ensporede tunneller er nærmest livsfarlige!"* Tað skrivar danski tíðindamaðurin Flemming Andersen í blaðnum Urban.

Umframt nakrar spotskar, men kannska beinraknar, metingar um matstovurnar uttan fyri Tórshavn og troyttar føroyskar bygdir, so gevur greinin í danska dagblaðnum URBAN, sum heild, Føroyum eitt rættuliga positivt skoðsmál, sum ferðamannland.

**Gløgt er gestsins eyga**

Tíðindamaðurin hevur, sum so mong vitjandi í Føroyum, langt merki til væntandi trygdina í teimum gomlu bergholunum í Føroyum, sum bara hava eina koyribreyt. Eftir mínum tykki, so málber hann seg milt, tá hann sigur, at hesi eru "nærmest livsfarlige". Skuldi eg sjálvur sagt tað, so haldi eg, at hesi gomlu bergholini eru beinleiðis deyðsfellur.

Bergholini vóru eitt veldugt framstig, tá tey komu, og hava óiva bjargað teimum bygdasamfeløgunum, tey vóru ætlað at náa, og helst onkrum mannalívi eisini. Men, sum ferðslan hevur ment seg, eru hesi bergholini vorðin aldeilis ótíðarhóskandi.

Tað er ikki bara tað, at tey eru ov trong og forða fyri nýtímans ferðslu við bingjum og øðrum stórri góðsi. Men, trygdin í bergholunum er NUL! Har er onki ljós, ongi eldsløkkitól og ongin fráboðingarskipan.

Farleiðin eg kenni best, eru Borðoyabergholini, har ferðslan stundum kann vera øðiliga, ja holini eru nærmast stappað við akførum, í samband við t. d. grindadráp, góðveðursdagar ella serliga tiltøk. Skuldi ein vanlukka við mannsskaða hent ein slíkan dag, og tað sum ringast er, skuldi eldur komið í ein bil, so hava bjargingarliðini als ongan møguleika at sleppa frammat.

Hvussu boðar tú frá eini vannlukku, har tað ikki ber til at boða frá?

Mong dømi eru um, hvussu vandamikið tað er, um eldur kemur í inni í einum bergholi – holini virka sum blásilampur; ja, sum onkur tók til í samband við ógvusliga eldin inni í Mont Blanc, tær virka sum jetmotorar.



Hendir ein vanlukka, so nyttar onki at royna at sleppa sær útaftur úr hesum bergholunum við einari koyribreyt, tí tá ferðslan er sum mest slepst ongan veg - breytin er full báðar vegir, og víkiplássini við. Og við tað, at ikki ber til at boða frá, so er vanlukkan longu hend! Tað einasta bjargingarliðini tá kunnu gera, er at rudda upp eftir eina synarliga vanlukku, sum Gud havi lov, enn ikki er hend. Men føroyska herrópið: Tað gongur nokk, er ongin trygd fyri trygdini, heldur ein vanvirðing fyri trygdini.

Sjálvandi eiga sandoyarfólk at fáa besta ferðasamband, ið til ber. Men áðrenn tingið fer at taka støðu til at nýta føroyskar gummikrónur til eina risa íløgu á eini farleið, sum er sera trygg, og eftir umstøðunum, eisini tíðarhóskandi (skipið er spildur nýtt, og milliardirnar í Gomlurætt og Skopunnar havn skulu jú tjenast innaftur), so eigur tingið at hugsa um deyðsfellurnar sunnast og norðast í landinum, tey gomlu bergholini við einari koyribreyt og ongari trygdarskipan.

**Sýnir tingið vannvirðing fyri trygd og mannalívum?**

Tað er ófatuligt, at tinglimir sum hava koyrt gjøgnum hesi bergholini í áravís, ikki duga at síggja, ella hava gjørt vart við vandan á ein dyggiligan hátt. Talan má vera um okkurt slag av svøvnstøðu, ella um vanvirðing fyri trygd og mannalívum. Tað gongur nokk – ja, inntil tað ikki gongur longur!

Meðan bíðað verður eftir einari dyggiligar og varðandi loysn á spurninginum um tey gomlu bergholini, so eigur tað sjálvandi at verða kravt sum eitt minimum, at eldsløkkitól og fráboðannartelefonir verða hongd upp fyri hørjar hundrað metrar í holunum, at samband fæst um fartelefonina, og at skipað verður fyri eini ljósregulering, tá ferðslan er sum mest. Hettar fer ikki at kosta trí kvart milliardir.

Samtykkir løgtingið hinvegin eina íløgu uppá 700 milliónir (Hestur íroknað sjálvandi), fyri at bøta um eina trygga farleið, uttan at bøta um trygdina í teimum gomlu bergholunum við einari koyribreyt, so sýnir tingið samstundis "foragt", vanvirðing fyri trygd, fyri mannalívum, fyri teimum, ið skulu nýta hesi bergholini dagliga, og fyri teimum, sum koma at vitja.

# Løgmaður, gloym ikki tey sum bera brek

HEÐIN D. POULSEN



Í undirskjali til løgmansrøðuna er skrivað, at løgmaður skal seta ein arbeiðsbólk at kanna hvat skal til fyri at seta altjóða sáttmálan um rættindi teirra brekaðu í gildi í Føroyum. Sáttmálin er besta trygdin fyri, at tey sum bera brek, fáa janvstøðurættindi, og ger tað ólógligt at gera mismun vegna brek, nakað sum ikki er ásett í føroyskari lóggávu. Tí eigur sáttmálin at verða settur í gildi fyri Føroyar samstundis sum sáttmálin verður settur í gildi í EU, allarhelst í 2008. Hetta kann ikki bíða.

**Tað fíggjarliga eingin umbering**

Røddir sum tala ímóti at seta sáttmálan í gildi siga, at tað verður ov dýrt. Hetta sjónarmið kann ikki góðtakast, tá lond sum vit vanliga meta sum fíggjarliga veikari enn Føroyar, sosum Armenia, Polen og Litava hava undirskrivað, og boða frá, at tey fara at seta sáttmálan í gildi í næstum, og at eitt land sum Kroatia longu hevur sett sáttmálan í gildi.

**Fyrireiking skal til**

Tað sum krevst, eru málrættaðar fyrireikingar, og tað batar einki bert at seta enn ein arbeiðsbólk. Tað er neyðugt at seta arbeiðsbólkinum krøv og geva honum karmar. Kravið eigur at verða, at arbeiðið skal verða liðugt á sumri 2008. Fyri at kunna seta sáttmálan í gildi, skal bæði Løgting og Fólkating samtykkja hann, tí eigur sáttmálin at koma í gildi í Føroyum, samstundis sum Danmark setur hann í gildi, so slepst undan, at Danmark skal taka fyrivarni fyri Føroyum. Umframt EU londini, hava bæði Ísland og Norra, sum okkara grannatjóðir eisini boða frá at tey fara at seta sáttmálan í gildi.

**Eftirbátur**

Um løgmaður ikki fer til verka nú, kunnu vit koma at standa einsamøll á altjóða pallinum tá umrædur rættindi teirra brekaðu.

Meira er at lesa um sáttmálan á www.un.org/esa/socdev/enable/

# Skotin í lærið við luftbyrsu

**Í gjárkvøldið varð ein av manningini á Bliki skotin í lærið við einari luftbyrsu, tá hann og nakrir aðrir av manningini vóru farnir ein gongutúr á keiini í Hirtshals**

SKOTTILBURÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av manningini á føroyska farmaskipinum Bliki varð í gjárkvøldið skotin í lærið við einari luftbyrsu.

Hendingin fór fram um níggju tíðina í gjárkvøldið, tá maðurin saman við øðrum av manningini vóru farnir ein gongutúr á keiøkinum.

- Tað vóru nakrir mans av Bliki, sum gingu eftir Sindalvej niðri á havnarlagnum í Hirtshals, tá ein bilur kemur koyrandi spakuliga aftanfyri teir. Tá bilurin er einar tríggjar metrar frá monnunum hoyra teir eitt ljóð, og tá tann eini av monnunum tekur seg til lærið varnast hann, at hann er raktur av onkrum, sum vit meta er eitt høgl frá einari luftbyrsu, sigur vakthavandi á Hjørring Politi.

Maðurin varð fluttur á sjúkrahús, har lærið var røntgenavmyndað, og vísti myndin nakað, sum helst var eitt høgl. Vakthavandi sigur, at vandi ongantíð var á ferð, og at maðurin slapp aftur av sjúkrahúsinum, tá høglið var tikið úr lærinum.

Á politistøðini í Hjørring meta teir ikki, at nakað serligt lá aftan fyri hendingina, og at manningin av Bliki bert var á skeiva staðnum, tá nakrir unglingar stuttleikaðu sær í so nógv. Men sjálvandi kanna teir málið, sigur vakthavandi á politistøðini í Hjørring.



*Ein av manningini á Bliki varð skotin í lærið í Hirtshals í gjárkvøldið*